# Tað er meiri enn fulltíðarstarv at venja KÍ

KLAKSVÍKAR ÍTRÓTTARFELAG
FO-700 Klaksvík
Tlf. 456184 / 456167
www.ki-klaksvik.fo

STOVNAÐ:
24.08.1904

FORMAÐUR:
Gestur Hovgaard

MEISTARAR (17):
1942, 1945, 1952, 1953, 1954, 1956, 1957, 1958, 1961, 1966, 1967, 1968, 1969, 1970, 1972, 1991, 1999

STEYPAVINNARAR (5):
1966, 1967, 1990, 1994, 1999

GREIPUVINNARAR (3):
1966, 1967, 1999

Í 1. DEILD (61 ÁR):
1942-43, 1945-

Í EUROPA (7):
Meistarakapping 1992/93, 2000/01, Steypavinnarar 1995/96, UEFA Cup 1997/98, 1999/2000, 2002/03, 2003/04

**Hann er dani og hevur umframt í heimlandinum búð í Eysturríki og Japan. Eldhugurin hjá klaksvíkingum fyri fótbóltinum var orsøkin til, at hann valdi at flyta til Føroya, og hann sigur seg trívast við uppgávuni, sum er 24 tímar um samdøgurði**

**Jóannes Hansen**
*joannes@sosialurin.fo*


*Atli Danielsen er nýggjur liðskipari hjá KÍ*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Í november var hann fyrstu ferð í Klaksvík. Tá ið hann hevði verið har í tveir dagar, høvdu hann og konan gjørt av, at tey skuldu flyta til Klaksvíkar. Í fyrstu atløgu er talan um eitt ára sáttmála. Um tað verður til meiri enn tað, fæst at vita í september. Í sáttmálanum eru karmarnir stungnir út fyri framtíðar samstarvi. Tað verður trivnaðurin fyrsta árið, sum ger at gera av, um talan skal verða um samstarv í fleiri ár.

– Higartil hava konan og eg ikki í eina løtu angrað, at vit fluttu henda vegin. Eg brenni fyri fótbóltinum. At hava henda hugburðin er framúr í Klaksvík. Fyrsta dagin eg var her í november, royndi eg, hvussu stórur áhugin var. Gamlir menn tosa um fótbólt, og tað er fasinerandi at síggja børn og ung spæla fótbólt inntil út ímóti midnátt.

Ove Flindt-Bjerg hevur einki ímóti at tosa – nógv og skjótt. Hann veit, hvat hann tosar um. Hann spældi í AaB í Aalborg, har heimasíðan hjá felagnum sigur hann vera ein av mest avhildnu í felagnum. Hann var danskur landsliðsspælari, hann hevur spælt í Eysturríki og Japan, har tað vóru 60-65 túsund áskoðarar til dystirnar og eini 2-5 túsund uttanfyri høgu girðingarnar kring venjingarvallirnar. Fótbóltsáhugin hjá klaksvíkingum kennist upplyftandi hjá venjaranum, sum frammanundan hevur verið venjari í Eysturríki og Fjareystri.

– Í UEFA og FIFA verður nógv tosað um tað harmuliga í, at impulsiva fótbóltsspælið á gøtum og strætum ikki er til longur. Í Klaksvík sæst hetta frá morgni og til myrkurs. Tað verður spælt á leikvøllinum, tá ið KÍ ikki venur, og tað er alneyðugt, at felagið fær betri vallarumstøður, soleiðis at børnini sleppa at folda seg út. Hetta er avgjørt nakað, sum felagið fer at fáa gagn av.

## Betri enn í Eysturríki

Tá ið vit fregnast hjá KÍ venjaranum, hvussu umstøðurnar eru í føroyska amatørfelagnum, tá ið sammett verður við har, sum hann hevur roynt seg, so heldur hann, at KÍ er fótbóltsfelag á hægri støði enn feløg, sum hann hevur spælt við á hægsta støði í Eysturríki:

– KÍ hevur stórt potentiali. So nógv børn spæla fótbólt, at tað hevði verið óhoyrt aðra staðni. Raksturin tykist vera í góðari legu, og øll barna- og ungdómsliðini hava venjarar. Avbjóðingin er, hvussu stóra potentialið verður umsitið. Skal hetta eydnast, krevst nógv og støðugt arbeiði, og tað haldi eg, at felagið er hugað at gera. Tað restar nógv í, men tað gongur rætta vegin. Leiðslan í felagnum, sum eg frá fyrstu ferð vit hittust, havi havt góðan samklang við, veit, at okkum umframt fleiri vallir restar fleiri umklæðingarhølir og felags hølir. Stóra ynskið fyri KÍ og føroyskan fótbólt sum heild er, at tað verða bygdar fótbóltshøllir. Um hetta fer at eydnast, so verður møguleiki at spæla fótbólt alt árið. Nú verður spælt í 8-9 mánaðir. Tað er ov lítið. Førleikin svinnur í langa vetrarsteðginum. Fótbóltshallirnar høvdu avmarkað óhepnu gongdina heilt nógv, heldur Ove Flindt-Bjerg.

| Navn | Í fjør | Landsdystir | áður spælt við |
|---|---|---|---|
| **Málverjar** | | | |
| Jákup Mikkelsen | 32/-61 | | Herfølge, Molde, Partick Thistle |
| Mattias Samuelsen | | | |
| **Verjuspælarar** | | | |
| Ovi Nysted | 15/3 (6–0) | | |
| Niclas Niclassen | 3/0 (0–0) | | |
| Aleksandar Djordjevic (JUG) | 13/0 (2–0) | | |
| Jan Andreasen | 13/2 (3–0) | | |
| John Havn | | | |
| Andrass Jacobsen | | | |
| Marek Viercbicki (PÓL) | | | B71, FS Vágar, VB, ÍF EB/Streymur |
| **Miðvallarar** | | | |
| Harley Bertholdsen | 18/0 (0–0) | 5/0 | |
| Jan Joensen | 10/0 (2–0) | | |
| Atli Danielsen | 17/4 (3–0) | 4/0 | |
| Allan Joensen | 15/1 (3–0) | 8/0 | |
| Símun Joensen | 15/1 (2–0) | | |
| Arnold Joensen | 13/0 (0-0) | | B68 |
| Leon Bjartalíð | 15/3 (1–0) | | |
| Fríðin Ziskason | 7/0 (1–0) | | B68 |
| Jón Jacobsen | 1/0 (0-0) | | |

| Navn | Í fjør | Landsdystir | áður spælt við |
|---|---|---|---|
| Frank Joensen | | | |
| David Bertholdsen | | | |
| **Álopsspælarar** | | | |
| Erling Fles | 6/2 (0-0) | | |
| Eyðun Klakstein | 15/0 (2–0) | | ÍF |
| Jacob Bymar (DAN) | 8/0 (1–0) | | Esbjerg |
| Stig Edvin Aksnes (NOR) | | | Norheimsund |
| Julian Samuelsen | | | |
| **Tilgongd** | | | |
| Jákup Mikkelsen | | | Partick Thistle |
| Marek Viercbicki | 18/2 (0-0) | | EB/Streymur |
| Stig Edvin Aksnes | | | Norheimsund, Noreg |
| David Bertholdsen | | | Fluttur upp |
| Julian Samuelsen | | | Fluttur upp |
| Mattias Samuelsen | | | Fluttur upp |
| Frank Joensen | | | Fluttur upp |
| **Frágongd** | | | |
| Karstin Joensen | 18/-30 | (0-0) | ÍF |
| Hjalgrím Elttør | 18/13 (0-0) | | Fremad Amager |
| **Venjari** | | | |
| Ove Flidt Bjerg (DAN) | | | |



# Uppskriftin er einføld og meistaraskapurin langt burtur

**Hóast liðið útinnir tað, hann vil, so vil nýggi KÍ venjarin ikki at smekka í stóru trummu og bjóða sítt lið fram sum álvarsfullan biðil til FM heitið**

**Jóannes Hansen**
*joannes@sosialurin.fo*

Tað er ikki nóg mikið at produsera eitt hundrað ára logo og so rokna við, at FM heitið fer at koma av sær sjálvum.

Hetta er ein av paradunum, sum nýggi KÍ venjarin nýtir, tá ið vit tosa við hann um vánirnar fyri árið, ið er serstakt fyri felagið hjá honum, tí KÍ 24. august verður eitt hundrað.

Ove Flindt-Bjerg dugir at svara, og hann tykist vita, hvat hann tosar um. Tað undrar tað ikki, at hann hevur gott fótbóltsinnlit. Meiri undrunarvert er tað, at hann, eftir at hava verið tveir mánaðir í Klaksvík, kennir nógv til umstøðurnar í býnum og í føroyskum fótbólti sum heild.

*Hvat skal til fyri at KÍ skal hátíðarhalda hundrað ára føðingardagin sum meistari?*

– Tað skal meiri til, enn eg megni at vera við til at byggja upp í ár. Ikki minst royndirnar frá Innsbruck, har vit við jugoslavanum Branko Elsner sum venjara – honum lærdi eg framúr nógv av, sjálvt um eg var sosialur danskari, meðan hann var asosialur eystureuropeari – eftir fimm árum vunnu sjey titlar. Tað tók trý ár at mynda tað liðið. Har vóru eldri og royndir spælarar, ungir og ágrýtnir spælarar, teir, sum hugsaðu og stýrdu, arbeiðsmenninir og teir meiri hugflogsríku. Uppskriftin er ymsar typur á liðnum. Allir skulu skilja sín serstaka leiklut og fata týdningin av samanhaldi og liðavriki. Hetta kemur ikki av sær sjálvum. Tað skal hart arbeiði og miðvís venjing til, og meiri enn í eitt ár.

*KÍ hevur nógvar royndar og evnaríkar spælarar?*

– Útgangsstøðið er gott. Men vit mynda eitt nýtt lið. Spælskipanin er 4-4-2 við lutfalsliga smølum diamanti á miðvøllinum. Kropsliga og í bóltførleika haldi eg, at okkara eru á hædd við teir flestu, sum eg havi sæð í Føroyum, meðan vit eru aftanfyri fleiri í taktiska partinum av spælinum. Hesum arbeiða vit við. Í verjuspælinum er neyðugt at økja um tilvitanina og automatikkin. Nógv tíð fer til at innarbeiða mekanismurnar. Tí røkka vit ikki á mál í ár.

*Hvat er so málið fyri í ár?*

– Fyrsta málið er altíð at seta sær fyri at vinna næstu ferð. Samlaða úrslitið verður treytað av, um tað fer at eydnast at skjóta fleiri mál enn í fjør, og um tað fer at eydnast at avmarka talið á málum, sum fara ígjøgnum, tá ið sammett verður við í fjør. Um vit megna av skjóta fimm mál fleiri enn í fjør, og um mótstøðuliðini skjóta fimm mál færri enn í fjør, so verða fyritreytirnar betri fyri, at vit kunnu vera við har, sum tað er stuttligt at kappast.


*Danin, Ove Blint-Bjerg, hevur ábyrgdina av KÍ-liðnum nú felagið verður 100 ár*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Lítil helmingur eru ungir dreingir

Síðani fyrstu venjingardystirnir vórðu spældir, hevur verið tosað og skrivað ikki sørt um, at KÍ spælararnir eru ov gamlir. Víst hevur verið á, at einir átta spælarar eru um tredivu ára aldur ella eldri enn so.

Venjarin sær ikki stóran vanda í, at hann hevur tilkomnar spælarar at velja ímillum. Men hann heldur tað vera óheppið, at tað á liðnum ikki eru fleiri spælarar, ið eru miðskeiðis í tjúgunum.

– Í prinsippinum hevur aldurin einki at siga. Liðið skal altíð mannast við teimum, ið eru best kvalifiseraðir. Nakrir av teimum mest tilkomnu fara heilt víst at vera millum stuðulsspælararnar. Eg havi skilt tað soleiðis, at nakrir av teimum, sum eru miðskeiðis í tjúgunum, og sum áttu at havt verið her, eru farnir aðra staðni at spæla. Tað kunnu vit einki gera við. Eg gleði meg um, at vit hava nógvar ungar spælarar, og eg eri vísur í, at onkrir teirra fara at vera millum berandi kreftirnar, sigur Ove Flindt-Bjerg.

KÍ venjarin heldur tað vera hugaligt, at so nógvir spælarar hava verið til venjingar. Hann ásannar samstundis, at tað verður neyðugt at avmarka talið á teimum, sum venja við besta liðnum. Annars fæst tað ikki burturúr venjingarkvøldunum, sum spælararnir eiga at rokna við, at teir kunnu fáa burturúr.

– Vit skulu vera 22 í besta hópinum. Av teimum eru nakrir unglingaspælarar. Um onkur teirra viðhvørt fer at fáa møguleikan á 1. liði, fer tíðin at vísa. Tað ræður um so við og við at halda teimum til.

**Metingin**

KÍ byggir fyrst og fremst á somu spælarar sum í 2003, men liðið eigur at fáa betur úrslit enn í fjør. KÍ verður 100 ár í ár, og felagið eigur at gera seg galdandi millum trý tey fremstu feløgini

## Hugburðsbroyting

Ove Flindt-Bjerg heldur ikki, at tað fer at bera til at krevja av spælarunum, at teir skulu venja meiri, enn teir hava gjørt í ár. Fimm ferðir um vikuna er meiri, enn AaB vandi, tá ið Ove í 1987 sum 39 ára gamalur rundaði av í donskum fótbólti.

– Summar venjingar eru longri, og summar eru styttri. Lyklaorðið er kvalitetur í venjingunum. Tað frøðir meg, at spælararnir vísa góðan hugburð. Spurningurin er, hvussu vit kunnu koma víðari, tá ið vit ikki kunnu venja meiri. Eg veit, hvørjar fyritreytir mítt lið skal hava, um vit skulu hugsa um at gerast betri, sigur Ove Flindt-Bjerg, og so útgreinar hann:

– Vit hava Jákup Mikkelsen, sum hevur verið fulltíðar yrkisspælari. Hann er hjálparvenjari hjá mær, men í fyrstu atløgu hava vit gjørt av, at hann skal leggja nógv fyri í venjingini. Hann er komin aftur til barndómsfelagið, og tað verður roknað nógv við honum. Tað er týðuligt, at Jákup hevur professionellan hugburð til fótbóltin, og hinir spælararnir eiga at læra nógv at honum.

*Hvat hugsar tú um?*

– Eitt er hugburðurin undir venjingini. Eitt annað er lívshátturin, og eitt triðja er, hvussu spælararnir fyrireika seg til dystirnar. Tá hugsi eg um hvíld og svøvn, um mat og drekka og royking og rúsdrekka. Eg leggi meg ikki út í, hvat spælararnir nýta frítíðina til, tá ið teir nýta so nógva tíð til fótbóltin, og tá ið fleiri teirra hava familju. Men um vit í felag skulu røkka málum, so er alneyðugt, at teir liva og hugsa, sum fótbóltsspælarar eiga at gera. Eg havi upplivað, at spælarar, sum eg rokni nógv við, eru møttir við chips og cola, tá ið vit hava fyrireikað okkum til dyst. Tað er ikki optimalt, og tað havi eg sagt við spælararnar.

## Halda kósina

Tá ið vit tosa um royndirnar higartil í ár, so vísir KÍ venjarin, at hann framvegis ikki hevur gloymt, at hann er ættaður úr Norðurjyllandi, har teir altíð hava verið kendir fyri at undirspæla sín leiklut.

Ove Flindt-Bjerg ásannar, at tá ið hann var komin aftur til Klaksvíkar eftir 3-0 tapið á HB í Gundadali, so rannsakaði hann seg sjálvan fyri at vita, um hann nú var farin undir uppgávuna á tann hátt, sum hann átti at havt gjørt.

– Eg mátti staðfesta, at HB var betri enn vit mitt í mars, og eg rokni teir at vera frammanfyri okkum og upplagt boð upp á FM heitið. Í Klaksvíks kappingini gekk tað væl betri hjá okkum. Tað skal ikki leggjast ov nógv í sovornar kappingar, tí tá verður roynt at finna út av, hvat er gott og hvat er minni gott. Men tað gongur rætta vegin, og tað gevur mær og okkum áræði at halda fram.

*Tú heldur framvegis ikki, at klaksvíkingar hava møguleika at vinna FM, nú teir fylla hundrað?*

– Vit sláa ikki í stórutrummu um, at vit ætla at vinna FM. Tað hava vit í løtuni ikki førleikan til. Men eingin í fótbólti sigst undan, um møguleikin fyri at vinna nærkast veruleikanum. Um vit megna ítøkiligu málini, sum eg nevndi í áðni, so fara vit at vera við har, sum tað verður hugaligt at kappast.